# Eldur í Vági og í Tórshavn

**Verkstaðsbygningur í Vági brendur niður, og løgreglan á Tvøroyri sigur seg hava eina hóming av, hvør orsøkin var til eldsbruna. Á Argjum varð ein bilur stolin, og okkurt smávegis óhapp er hent í Suðurstreymoy. Eini sethús í Havn eru brend niður. Orsøkin til eldsbrunan er ókend**

ÓHAPP OG STULDUR

*Heini S. Kristiansen*
*Heini@sosialurin.fo*



*Sera nógvur roykur kom frá bygninginum, tá eldurin brann á tað harðasta. Eisini hoyrdist buldur og brak*

Á miðdegi sunnudagin kom eldur í stóra verkstaðsbygningin hjá P/F Auto Vulk í Vági. Hálvan annan tíma seinni var eldurin sløktur, men tá var alt í verkstaðsbygninginum, uttan sjálv húsagrundin úr betongi, kolað upp:

– Har er at kalla einki eftir av bygninginum. Alt má byggjast av nýggjum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini á Tvøroyri við Portalin.

Enn er ikki heilt greitt, hví eldurin kyknaði í verkstaðsbygningin, men á løgreglustøðini á Tvøroyri hava tey tó ein varhuga:

– Ein maður stóð fyrr á degnum og sveisaði bilgáttur á ein bil tætt við verkstaðsbygningin. Tá hann var liðugur, fór hann eitt ørindi. Løtu seinni, tá hann kom aftur, var longu stórur eldur í bygninginum. Helst er eldur kyknaður í bilin og síðan í bygningin, sigur vakthavandi á løgreglustøðini á Tvøroyri við Portalin.

### Bilur stolin, ferðsluóhapp og nógvur vindur

Á løgreglustøðini í Havn hevur telefonin gingið heit. Orsøkin til hetta er, at fleiri royndu at boða løgregluni frá einum álvarsomum óhappi á Sundi. Men at tað í veruleikanum bert var ein royndarvenjing hjá næmingum á vetrarskeiðnum í dugnaskapi í sigling, vistu tey flestu ikki av:

– Hvørja ferð ein royndarvenjing er á skránni, ringir telefonin í heilum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn við Portalin.

Men løgreglan hevur tó havt annað at gjørt um vikuskiftið. Eitt nú hava nøkur ferðsluóhapp verið.

Fyri løtu síðan varð ein maður brádliga illa fyri, tá hann kom koyrandi niðan eftir Sundsvegnum í Havn. Maðurin slakaði ferðina, men hetta varnaðist bilførarin, ið koyrdi aftanfyri, ikki alt fyri eitt og rendi tískil inn í afturpartin á bilin hjá manninum. Eingin stórur bilskaði stóðst av hesum, men maðurin, ið varð illa fyri, varð alt fyri eitt fluttur á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum. Sum skilst var hendingin ikki so álvarsom, men maðurin er framvegis til kanningar.

Umframt hetta varð ein persónbilur stolin á Argjum, men hann var funnin aftur í Føgrulíð 19 við lyklunum í.

Tað var nógvur vindur og regn kring landið í vikuskiftinum, og hetta sæst somuleiðis aftur í notunum hjá løgregluni. Eitt nú fleyg ein leys takpláta á ein bil í morgun í Klaksvík, og klokkan 08.30 sunnumorgunin koppaði ein treylari av vegnum við rundkoyringina í Kollafirði. Bert materiellur skaði stóðst av óhappinum.

### Eldur í gomlum sethúsum

Klokkan 2.30 leygarnáttina vórðu boð send eftir løgregluni, tí eldur var kyknaður í einum gomlum sethúsum Yviri við Strond.

– Eingin hevur búð í húsunum í fleiri ár. Húsini eru úr betong, men alt timbri innan í húsinum er brent, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Enn veit løgreglan ikki at siga, hvussu eldurin, ið varð sløktur ein tíma seinni, kyknaði.

## Teknmálstulkatænastan á rundferð

**Í samband við at Teknmálstulkatænastan í Føroyum hevur 10 ár á baki, verður í hesum sambandi skipað fyri ymiskum tiltøkum gjøgnum árið**

TEKNMÁLSTULKING

Fyrsta tiltakið er ein kunningarferð í Føroyum, har endamálið er at varpa ljós á hesa tænastu og hvussu hon virkar. Kunningarferðin byrjar í Klaksvík, síðani verður farið til Suðuroyar, Eysturoyar og til Vágar, og endað verður við einum kunningarfundi í Tórshavn.

Tulkatænastan virkar við støði í Fyrimyndarreglunum hjá ST, ið siga: *Javnbjóðis rættindi til øll menniskju* – og fyri okkum merkir hetta, at fólk, bæði deyv og hoyrandi hava rætt til tulk fyri at kunna samskifta í øllum lívsins viðurskiftum.

Tulkatænastan, sum er ein almenn tænasta á fíggjarlógini, var sett á stovn 1. januar 1996. Tulkatænastan heldur til í MBF húsinum, á Íslandsvegi 10 í Tórshavn.

At byrja við var bert eitt hálvt tulkastarv á Tulkatænastuni, men í dag telur Tulkatænastan 1 ½ tulkastarv og eitt ½ tíðar skrivstovustarv.

Hesi 10 árini hevur Tulkatænastan veitt teknmálstulk til samskifti millum deyv og hoyrandi. Hetta tíðarskeið hevur tørvurin á tulki verið vaksandi og eru tulkingarnar tí eisini vorðnar meira fjøltáttaðar.

Á rundferðini fara vit at kunna um tulking frá ymsum sjónarhornum. Vit fara at tosa um tulking sæð frá tí deyva brúkaranum, frá teknmálstulkinum, og vit fara at kunna um tær tænastur, sum Tulkatænastan veitir.

Henda kunning er ætlað øllum, ið á ein ella annan hátt hava tørv á – ella áhuga fyri tulking. t.d í samskifti millum deyvar og hoyrandi brúkarar. Arbeiðspláss, starvsfelagir, familja, avvarðandi, heilsuverkið, fakfólk/mynduleikar, og onnur ið hava samband við deyv – ja øll, ið kunnu hava áhuga í hesum.

Fyrilestrarhaldarar eru: Gudrun Olesen, sum er deyv. Hon fer at siga frá um hennara royndir at brúka tulk.

Rannvá Eiriksdóttir, teknmálstulkur, fer at greiða frá tulkaarbeiði. Og Edny Poulsen, teknmálstulkur, fer at greiða frá Tulkatænastuni, bygnaði og virksemi.

Á fundunum verður, umframt fyrilestur, ein kaffimunnur at fáa, og møguleiki verður fyri práti og spurningum.

– Byrjað varð í Norðuroyggjum hóskvøldið 20. apríl. Síðani varð farið til Suðuroyar. Í morgin, mikukvøldið 26. apríl verða vit í Eysturoy í Hæddini í Runavík kl. 19:30

Hóskvøldið 27. apríl verða vit í Vágoynni í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági kl 19:30.

Seinasti kunningarfundur verður hóskvøldið 11. mai á Streymoynni í MBF-húsinum í Tórshavn kl 19:30.

Øll eru hjartaliga vælkomin til fundirnar, og vónar Teknmálstulkatænastan, at nógv fólk koma til kunnandi fundirnar, tí vit meta at nógv størri samskifti kundi farið fram millum deyv og hoyrandi, um bert fólk vistu meiri um hetta økið, sum nokk ikki er so sjónligt í dag.

Við hesi kunningarferðini ynskja vit at fremja størri vitan á økinum og gera samskiftisgjónna millum deyv og hoyrandi minni. Eisini vóna vit, at almennir myndugleikar vilja koma við á fundirnar, so týdningurin av, at deyv betur kunna samskifta við myndugleikarnir kann betrast í framtíðini.

## DJ-SHOW í høllini á Kambsdali

**Klaksvíkingar sleppa ókeypis til stóra DJ-Showi á Kambsdali komandi leygarkvøld**

UNDIRHALD

Stórt tiltak við DJ-SHOW og The Dreams verður í Høllini á Kambsdali Leygarkvøldið 29. apríl. Og av tí at tunnilin til Klaksvíkar júst er opnaður, sleppa klaksvíksingar ÓKEYPIS við bussi aftur og fram til tiltakið, um nóg nógv teknað seg.

Gjaldast skal fyri atg.merki til tiltakið í bussinum.

Og sjálvandi er tað eingin annar enn Martin Kjærbo, helst Føroya besti DJ, sum fer at leggja fløgur á. Men tað er enn meira tónaguff á skránni, tí vit skulu eisini hoyra nýggju fløguna hjá The Dreams »LIVE«. Teir hava júst verið í Studio (í Klaksvík sjálvandi) og spælt inn nýggju fløguna.

Her er talan um góðar gamlar slagarar, so sum 80´ini hjá Frændum, sa sa sa sa hjá Georg Eystaná, summer of 69 hjá Bryan Adams og nógv onnur framúrskrandi góð løg í nýggjum The Dreams sniði. Teir framførdu nøkur av løgunum í SMS herfyri og tað má sigast, at gomlu slagararnir verðuliga hava fingið nýtt lív.

Sum nevnt so fáa klaksvíksingar eina stóra gávu og kunnu koyra ókeypis báðar vegir, úr og til Klaksvíkar aftur, men sum nevnt, at goldið verður fyri atg.merki til tiltakið á kambsdali, áðrenn fráferð úr Klaksvík.




Les Sosialin so ert tú við